## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri og landsynningi og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og támut veður og regn av og á. Um kvøldið minni vindur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

*Manningin á SALT í tí rætta umhvørvinum*




# SALT til Skotlands at syngja

Aftur í ár fer bólkurin SALT til Skotlands at syngja á »Gospel Music Convention«, sum verður í Fraserburgh í Skotlandi í døgunum 30. apríl til 2. mai. Tey vóru eisini við í fjør og vórðu so væl umtókt, at tey blivu boðin at koma aftur í ár.

Bólkurin SALT er mannaður við hesum fólkum: Paula Jacobs, Leirvík, Arnvør á Torkilsheyggi, Nes, Bárður á Lakjuni, Leirvík, Johan Magnus Olsen, Saltnes, Edna Jacobsen, Fuglafjørður, Elsebeth Lassaberg, Fuglafjørður og Óli Chr. á Torkilsheyggi, Nes.

Arnvør er leiðari av bólkinum, sum nú venur til ferðina. Venjingin er á Nesi hvørt mánakvøld.

Heimasíðan hjá Gospel Music Convention er: www.gmcscotland.com



*Salt, ein sera væl-umtóktur og spennandi gospelsangbólkur*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷1 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 11 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 22 |
| New York | 23 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | – |
| La Paz | 5 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lagtrýst, 975 hPa. í útsynning úr Føroyum fer vestureftir og grynnist., Eitt annað lágtrýst, 995 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Skotlandi og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer norðureftir og grynnist spakuliga. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/04 kl. 06⁰⁰– 20/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,6°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,4 mm – mált frá 19/04 kl. 06⁰⁰–20/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 59,1 mm

GEVIÐ BLÓÐ
Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

## VESTFALLSKYRRINDI

19. apríl: Tendring
24. apríl: Mánin longst frá jørðini
27. apríl: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. apr | 08.45 | 21.06 | 07.45 | 20.06 | 08.00 | 20.21 | 10.45 | 23.06 | 11.45 | — | 07.00 | 19.21 | 06.00 | 18.21 | 09.00 | 21.21 | 10.00 | 22.21 | 08.30 | 20.51 | 09.45 | 22.06 |
| 22. apr | 09.28 | 21.51 | 08.28 | 20.51 | 08.43 | 21.06 | 11.28 | 23.51 | 00.06 | 12.28 | 07.43 | 20.06 | 06.43 | 19.06 | 09.43 | 22.06 | 10.43 | 23.06 | 09.13 | 21.36 | 10.28 | 22.51 |
| 23. apr | 10.14 | 22.37 | 09.14 | 21.37 | 09.29 | 21.52 | — | 12.14 | 00.51 | 13.14 | 08.29 | 20.52 | 07.29 | 19.52 | 10.29 | 22.52 | 11.29 | 23.52 | 09.59 | 22.22 | 11.14 | 23.37 |
| 24. apr | 11.01 | 23.25 | 10.01 | 22.25 | 10.16 | 22.40 | 00.37 | 13.01 | 01.37 | 14.01 | 09.16 | 21.40 | 08.16 | 20.40 | 11.16 | 23.40 | — | 12.16 | 10.46 | 23.10 | — | 12.01 |

5 707265 100036 >